# Gerðabók hjá Vestmanna bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 18. september 2025, kl. 17.00

| | |
|---|---|
| **Møtt á fundi:** | Sára Jógvansdóttir, Anja Haldansen, Símun Jákup Højsted, Jákup Jóanesarson, Karl A. Olsen, Janus A. Jensen og Pauli Magnussen. |
| **Skrivari:** | Sólvit Nolsø |

Áðrenn fundin spurdi Sára Jógvansdóttir, borgarstjóri, um loyvi at fáa mál nr. 65, umskipan av skuld, á dagsskránna. Málið var viðgjørt í vinnu- og havnanevndini og í fíggjarnevndini fyrr á degnum. Tað var einmælt samtykt.

**Mál 60**
2. viðgerð av eykajáttan til trýstbingju – j.nr. 700002-1-2025.
Umsitingin mælir til at keypa eina trýstbingju afturat verandi trýstbingju, fyri at fáa sum mest burturúr og fyri at minka um útreiðslurnar av heinting og burturbeining.

Kostnaðurin fyri eina nýggja trýstbingju er 215.000 krónum uttan mvg.

Nevndirnar mæla til eykajáttan, og Fíggjarnevndin mælir til, at eykajáttanin verður uppá 250.000 kr. Eykajáttanin var einmælt samtykt við fyrstu viðgerð á bygdaráðsfundi 27. august 2025.

**Viðv. 60.**
Eykajáttanin var einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Mál 61**
Bygdaráðið samtykti í november 2024 at útbyggja kirkjugarðin á Knúgvum. Articon vann útboðið og vildi átaka sær arbeiðið fyri uml. seks milliónir krónur.
Upprunaliga skuldi arbeiðið verða liðugt við ársenda, men nú er sannlíkt, at tað verur liðugt longu í oktober 2025.
Upprunaliga var ætlanin at verkætlanini skuldi rindast í tveimum: tríggjar milliónir í 2025 og tríggjar milliónir í 2026. Tá verkætlanin sannlíkt er liðug áðrenn tíð, mælir umsitingin til, at tær tríggjar milliónirnar, sum skuldu rindast í 2026, vera framfluttar í eykajáttan til 2025, so øll upphæddin fellur í ár. Hetta m.a. fyri at hava eina størri íløgujáttan til annað í 2026. Játtanin verur funnin í innistandandi hjá kommununi. Kommunan eigur átta milliónir á bók og aðrar fýra eru á veg inn. Mett verur, at kommunan klárar íløguna, uttan at aktivera kredittin aftur.
Fíggjarnevndin samtykti einmælt 10. september at fylgja tilmælinum frá umsitingini og játta eykajáttanina.

**Viðv. 61**
Bygdaráðið samtykti einmælt at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini. Málið fer víðari til 2. viðgerð á næsta bygdaráðsfundi.

**Mál 62**
Bygdaráðið setti 200.000 krónur av í ár at gera eina gongubreyt í Miðalsbrekku.
Tilboðið upp á verkætlanin er upp á 442.000 krónur. Tí kann ikki meir enn hálvt arbeiði gerast í ár við pengunum, sum eru settir av.

Umsitingin mælir til, at fíggjarnevndin í eykajáttan leggur 242.000 afturat í verkætlanina, so hon kann gerast liðug í ár. Fíggingin verður tikin av pengum, sum kommunan hevur innistandandi, tí ikki er nóg mikið av taka av á øðrum kontum.

Ein samd fíggjarnevnd atkvøddi fyri tilmælinum frá umsitingini á fundi 10. sept.

**Viðv. 62**
Bygdaráðið samtykti einmælt at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini. Málið fer til 2. viðgerð á næsta bygdaráðsfundi.

**Mál 63**
Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi 8. september 2025 umsókmn frá Leivi Olsen o.fl. um syndurbýti av matr. nr. 260a, at fjøruluturin á Fitjum verður frá býttur og fær egið matr. nr. Nevndin mælir til at viðmæla umsóknina.

**Viðv. 63**
Eitt einmælt bygdaráð tók undir við tilmælinum frá teknisku nevnd.

**Mál 64**
Timbur- og snikkaratænastan hevur søkt um at sundurbýta matr. nr. 64a í fýra eigaraíbúðir. Tekniska nevnd viðgjørdi málið á fundi 8. september og mælir til at viðmæla umsóknina.

**Viðv. 64**
Eitt einmælt bygdaráð tók undir við tilmælinum frá teknisku nevnd.

**Mál 65**
Ocean Harvest hevur biðið um at fáa umlagt ein part av skuldini, sum felagið skyldar kommununi fyri trolaran Fram, sum lá við bryggju í Vestmanna.

Umsitingin hevur mælt til, at samráðingar skulu havast við Tummas Christophersen um skuldina.

Málið var viðgjørt í vinnu- og havnanevndini og í fíggjarnevndini áðrenn bygdarráðsfundin. Báðar nevndir viðmæla at fylgja tilmælinum frá umsitingini.

**Viðv. 65**
Eitt samt bygdaráð mælir til at fylgja tilmælinum frá vinnu- og havnanevndini og fíggjarnevndini.

Bókin lisin og fundur lokin 17:24.